Edmund Joensen
løgtingsmaður

Løgtingið

Løgtingsmál nr. 182/2010: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til Saltsilogrunnin

Uppskot

til

løgtingslóg um stuðul til Saltsilogrunnin

Kapittul 1
Stuðul

§ 1. Løgtingið heimilar landsstýrinum at veita stuðul upp á 20 mió. kr. at útgjalda samsvarandi byggigongdini til Saltsilogrunnin til at umbyggja og innrætta Saltsiloina á Tvøroyri til mentanarhús, umframt at veita ein árligan stuðul upp á 2,5 mió. kr. til at reka mentanarhúsið, eftir at tað er klárt at taka í nýtslu.

§ 2. Stuðulin í § 1 er treytaður av, at §§ 3-8 galda fyri Saltsilogrunnin.

Kapittul 2
Eftirlit og umsjón

§ 3. Landsstýrismaðurin hevur eftirlit og umsjón o.a. viðvíkjandi stuðlinum til Saltsilogrunnin.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin skal støðugt hava eftirlit við, at Saltsilogrunnurin alla tíðina lýkur treytirnar, sum settar eru í sambandi við at veita stuðulin, herundir at halda ásetingarnar í viðtøkunum.
Landsstýrismaðurin skal harumframt tryggja, at hann fær at vita um týðandi upplýsingar um møguligt óreglusemi, munandi frávik í mun til fíggjarætlan og møguligar fíggjarligar trupulleikar, og skal somuleiðis verða til reiðar í neyðugan mun at leggja uppí, um umstøðurnar krevja tað.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin skal ganga ígjøgnum roknskap, grannskoðanarprotokol, upplýsingar um virksemið, ársfrágreiðingar o.t. Eftirlitið skal m.a. vera:

1) Meta, um treytirnar fyri stuðlinum eru loknar fult út í tíðarskeiðinum.
2) Samanbera roknskap og fíggjarætlan og fáa greiðu á munandi frávikum.
3) Samanbera ætlað og gjørd arbeiði og fáa greiðu á munandi frávikum.

Kapittul 2
Broytingar í viðtøkum

§ 4. Landsstýrismaðurin skal góðkenna broytingar í viðtøkunum fyri Saltsilogrunnin.

Kapittul 3.
Roknskapur og grannskoðan

§ 5. Hesar reglur eru galdandi fyri roknskapin fyri Saltsilogrunnin:

1) Roknskapurin skal hava ein fastan kontuplan, sum er býttur sundur í slag og/ella endamál.
2) Roknskapurin skal vísa, at stuðulin er fórdur sum inntøka
3) Roknskapurin skal fata um rakstrarroknskap fyri allar inntøkur og útreiðslur, greinað sundur út frá

kontuplani, herundir avskrivingar og burturleggingar, umframt javnvágar-uppgerð yvir stutt- og langfreistaða ogn og skuld, herundir uppgerð av eginpeninginum.

4) Umframt roknskapin skal gerast frágreiðing um, hvussu stuðulin verður nýttur.

§ 6. Roknskapurin hjá Saltsilogrunninum skal verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara sambært hesum reglum:

1) Grannskoðanin skal verða gjørd sambært góðum grannskoðarasiði
2) Undir grannskoðanini skal verða staðfest, um roknskapurin er rættur, og um tær atgerðir, sum eru umfataðar av roknskapinum samsvara givnum játtanum, lógum og øðrum forskriftum umframt gjørdum avtalum og vanligari siðvenju.
3) Saltsilogrunnurin skal geva grannskoðaranum tær upplýsingar, sum grannskoðarin heldur hava týdning fyri at meta um roknskapin, og skal geva grannskoðaranum atgongd til at gera tær kanningar, sum grannskoðarin metir vera neyðugar, og skal syrgja fyri at grannskoðarin fær tær upplýsingar og ta hjálp, sum grannskoðarin metir vera neyðugar fyri at kunna gera sítt arbeiði.
4) Verður grannskoðarin varugur við lógarbrot, skal grannskoðarin beinanvegin geva Saltsilogrunninum boð um hetta og síggja til, at Saltsilogrunnurin innan 3 vikur gevur landsstýrismanninum boð um hetta. Um ikki, skal grannskoðarin boða landsstýrismanninum frá hesum.
5) Grannskoðarin førir grannskoðanarprotokol, har grannskoðarin greiðir frá gjørdum grannskoðanararbeiði umframt øllum munandi viðurskiftum, sum hava givið høvi til viðmerkingar. Somuleiðis verða upplýsingar um serlig eftirlitsarbeiði, serligar frágreiðingar, ráðgeving og hjálp førdar í grannskoðanarprotokollina.
6) Grannskoðaði roknskapurin fær eina átekning, sum vísir, at roknskapurin er grannskoðaður sambært hesum reglum. Fyrivarni skulu síggjast í átekningini
7) Saltsilogrunnurin skal árliga lata landsstýrismanninum avrit av grannskoðanarprotokollini saman við áteknaða ársroknskapinum.

Kapittul 4.
Játtanin dettur burtur – stuðulin gjaldast aftur

§ 7. Givnar játtanir kunnu detta burtur, og útgoldin stuðul kann verða kravdur goldin aftur, um Saltsilogrunnurin ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa stuðul ella ikki er førur fyri at fremja sítt virksemi á nøktandi hátt.

Kapittul 5.
Upplýsingarskylda og atgongd til at síggja og kanna roknskapartilfar

§ 8. Saltsilogrunnurin skal upplýsa um, at treytirnar fyri stuðlinum verða loknar.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur atgongd til at síggja og kanna roknskap og annað roknskapartilfar umframt atgongd til at staðfesta, at ognirnar eru til, og at virksemið er framt.

Kapittul 6.
Gildiskoma

§ 9. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kap. 1 Almennar viðmerkingar

Tann 17. februar 2010 góvu floksformenninir fyri 5 av politisku flokkunum í Løgtinginum tilsøgn um politiska undirtøku fyri, at landsstýrið kann veita stuðul upp á 20 mió. kr. at útgjalda samsvarandi byggigongdini til Saltsilogrunnin til at umbyggja og innrætta saltsiloina á Tvøroyri

til eitt mentanarhús, umframt at veita árligan stuðul upp á 2,5 mió. kr. til raksturin av mentanarhúsinum, eftir at tað er klárt at taka í nýtslu.

Grunnurin hjá A. P. Møller og konuni Chastine Mc-Kinney Møller til almenn endamál gav tann 29. november 2010 tilsøgn um stuðul upp á 20 mió. kr. til verkætlanina. Harumframt gav danski fíggjarmálaráðharrin Claus Hjorth Frederiksen tann 22. desember 2010 í brævi til nevndarformannin fyri Saltsilogrunnin tilsøgn um "at fáa undirtøku frá Fíggjarnevndini í Fólkatinginum fyri, at danski staturin kann játta 18 mió. kr. í 2011 til verkætlan Salt, tá heimildargrundarlagið fyri stuðul frá Løgtinginum og frítøku frá meirvirðisgjaldi er fingin til vega."

Saltsilogrunnurin varð stovnaður av Landsstýrinum og Tvøroyrar kommunu. Viðtøkurnar vórðu góðkendar av Tvøroyrar kommunu og Landsstýrinum ávikavist 10. og 28. apríl 2010.

Viðtøkurnar verða viðlagdar sum skjal 1.

Tá grunnurin varð stovnaður, var fæið fasta ognin, matr.nr. 7a, Øravík, sum kommunan læt.

Roknað varð við, at játtanin varð tikin við á fíggjarlógina fyri 2011. Hetta hendi tó ikki, tí mett varð, at málið um játtan mátti bíða, til heimild fyri stuðlinum varð fingin til vega við serstakari lóg.

Nevnda heimildargrundarlag kann fáast til vega við hesum lógaruppskoti um stuðul til Saltsilogrunnin. Verður lógaruppskotið samtykt verður søkt um eykajáttan í 2011 til stuðulin upp á 20 mió. kr.

Útgjaldingin tey trý árini 2011, 2012 og 2013 er treytað av, hvussu byggingin fer fram. Greitt verður frá hesum í komandi fíggjarlógaruppskotunum, umframt at politisku flokkarnir regluliga verða kunnaðir. Árliga rakstrarjáttanin verður ikki aktuell, fyrrenn mentanarhúsið letur upp, væntandi í 2013.

Í løgufíggjarætlan frá Saltsilogrunninum (viðlagt sum skjal 2) sæst, at roknað verður við, at løguarbeiðini koma at kosta 49.864.241 kr., umframt útreiðslur til ráðgeving 8.112.455 kr., tilsamans 57.976.696 kr. Harafturat kemur meirvirðisgjald 14.494.174 kr., men sambært framlagda lógaruppskotinum um broytingar í meirvirðisgjaldslógini, so kann Saltsilogrunnurin søkja um meirvirðisgjaldsendurgjald. Samlaðu løguútreiðslurnar 57.976.696 svara stórt sæð til samlaða stuðulin upp á 58 mió. kr.

Saltsilogrunnurin hevur gjørt eina rakstrarætlan fyri eitt 4-ára tíðarskeið. Inntøkur og útreiðslur til virksemisraksturin javnviga við 3 mió. kr. Viðvíkjandi vanliga rakstrinum, so eru lønir og aðrar rakstrarútreiðslur gjørdar upp til ávikavist 1,8 og 1,7 mió. kr. (ár 1), tilsamans 3,5 mió. kr., meðan á inntøkusíðuni er stuðulin frá Løgtinginum og kommununi gjørdur upp til ávikavist 2,5 og 2 mió. kr., tilsamans 4,5 mió. kr. Sostatt er eitt avlop á 1 mió. kr. (ár 1) áðrenn rentur og avdráttir, harav 600-700 tús. kr. eru ætlaði til serstøk alment gagnlig tiltøk. Í sambandi við stovning og rakstur av grunninum og neyðug útlegg í byggitíðini verður neyðugt við láni á áleið 3,5 mió. kr. umframt nýtslu av kassakreditti.

Í lógaruppskotinum eru umframt heimildini fyri stuðlinum (§ 1) reglur fyri a) eftirlit og umsjón (§ 3), b) viðtøkubroytingar (§ 4), c) roknskap og grannskoðan (§§ 5-6), d) at játtanin dettur burtur – stuðulin gjaldast aftur (§ 7) og e) upplýsingarskyldu og atgongd til at síggja og kanna roknskapartilfar (§ 8).

Í § 2 er áseting um, hví hesar reglur (§§ 3-8) verða gjørdar sum treyt fyri stuðlinum.

Viðvíkjandi hesum reglum verður annars víst til § 25 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Játtanarlógin) og viðmerkingar til lógaruppskotið umframt kapittul 5.5. í áliti um landsins játtanarskipan (2006).

Samsvarandi reglur verða í kunngerðini um lógarbundna játtan, stuðulsjáttan umframt stuðulsfyrisiting, sum seta í verk heimildirnar á økinum um landsins játtanarskipan, og sum eru um at verða lidnar í Fíggjarmálaráðnum.

Kap. 2 Avleiðingar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Talan er um eina íløgu upp á 58 mió. kr. uttan MVG, ið vil skapa munandi virksemi, serstakliga innan byggivinnuna í Suðuroynni.

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, serstakliga í Suðuroynni

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

Uppskotið er ikki tengt at millumtjóða sáttmála.

Uppskotið hevur við sær sosialar avleiðingar fyri mentanarlívið, serstakliga í Suðuroynni.

	Fyri landið/lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3 serligar viðmerkingar

Til § 1.
Í ásetingini er materiella heimildin fyri stuðlinum.

Til § 2.
Við hesum verður sett sum treyt fyri stuðlinum, at Saltsilogrunnurin gongur undir tær reglur um eftirlit og umsjón o.t., sum vanliga eru galdandi fyri stuðulsmóttakarar.

Til § 3.
Ásett verður, at landsstýrismaðurin hevur eftirlit og umsjón við stuðlinum til Saltsilogrunnin. Í stk. 2 og 3 eru reglur um eftirlit og seinni umsjón, jbr. § 25, stk. 1, nr. 6 í játtanarlógini.

Málsøkið er lagt til landsstýrismannin í fíggjarmálum, men økið kann verða lagt til annað landsstýrisfólk, um hetta verður mett hóskandi. Hetta kann gerast aktuelt í sambandi við, at løguskeiðið endar og rakstrarskeiðið byrjar.

Til § 4.
Sambært § 12 í viðtøkunum skulu broytingar í viðtøkunum góðkennast av landsstýrinum, men tá lóggávan um privatar grunnar er sett í gildi í Føroyum, skulu myndugleikarnir fyri føroysku grunnarnar góðkenna tær. Av tí at galdandi viðtøkurnar eru góðkendar av landsstýrinum, verður tað mett hóskandi, at broytingar somuleiðis skulu góðkennast av landsstýrinum. Hetta sama er galdandi fyri viðtøkur og broytingar í viðtøkum fyri sjálvsognarstovnar, sum fáa stuðul av einari ávísari stødd, jbr. § 25, stk.1, nr. 5 í játtanarlógini.

Sambært § 13, stk. 1 í viðtøkunum um avtøku av grunninum og stk. 3 um at nýta avtøkuvinning, skal hetta góðkennast av landsstýrinum, inntil myndugleikarnir fyri føroyskar grunnar hava fingið hesa heimild, jbr. § 14 í viðtøkunum.

Harafturímóti verður mett, at heimildin framhaldandi skal vera hjá landsstýrinum at tilnevna 1 av 3 nevndarlimum, jbr. §5, stk. 4 í viðtøkunum.

Til § 5.
Í ásetingini verður eitt minsta krav sett til roknskapin. Innihaldið svarar til tað, sum verður kravt av øðrum stórum stuðulsmóttakarum. Hetta verður sett í omanfyri nevndu komandi kunngerð, jbr. § 25, stk. 1, nr. 7 í játtanarlógini.

Til § 6.
Sambært viðtøkunum § 10 skal roknskapurin grannskoðast av einum løggildum grannskoðara, valdum av nevndini. § 6 í uppskotinum ásetir eitt minsta krav til grannskoðanina. Innihaldið svarar til tað, sum verður kravt av øðrum stórum stuðulsmóttakarum. Hetta verður eisini sett í omanfyri nevndu komandi kunngerð, jbr. § 25, stk. 1, nr. 7 í játtanarlógini.

Viðmerkt verður, at Løgtingsgrannskoðanin og Landsgrannskoðanin sambært § 15, stk. 1, nr. 2 í løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum o.ø. hevur atgongd til at fara ígjøgnum roknskapin.

Til § 7.
Ásetingin gevur nágreiniliga heimild til at lata givin lyftir um stuðul detta burtur, og at útgoldin stuðul skal gjaldast aftur, um treytirnar fyri stuðlinum ikki longur verða loknar, ella virksemið

ikki kann verða nøktandi fullført. Hetta verður somuleiðis sett í omanfyri nevndu komandi kunngerð, jbr. § 25, stk. 1, nr. 8 í fíggjarlógini.

Til § 8.
Ásetingin áleggur upplýsingarskyldu og gevur atgongd til á staðnum at síggja og kanna roknskap o.t. Hetta verður somuleiðis sett í omanfyri nevndu komandi kunngerð, jbr. § 25, stk. 1, nr. 9 í fíggjarlógini.

Skjøl viðløgd:

Skjal 1: Viðtøkurnar
Skjal 2: Fráboðan um politiska undirtøku 17. februar 2010
Skjal 3: Játtan frá Tvøroyrar kommunu 29. mars 2010
Skjal 4: Skriv frá danska fíggjarmálaráðharranum Claus Hjort Frederiksen 22. juni 2010
Skjal 5: Viðmerkingar til rakstrarætlan 29. september 2010
Skjal 6: Søguligt yvirlit 2. oktober 2010
Skjal 7: Skriv frá A. P. Møller grunninum 29. november 2010
Skjal 8: Skriv frá danska fíggjarmálaráðharranum Claus Hjort Frederiksen 22. desember 2010
Skjal 9: Byggikostnaður
Skjal 10: Rakstrarætlan
Skjal 11: Arkitektonisk frágreiðing
Skjal 12: Skitsa
Skjal 13: Longdarskurður
Skjal 14: Norður- og eystursíða
Skjal 15: Suður- og vestursíða
Skjal 16: Tvørskurður
Skjal 17: Perspektiv

Á Løgtingi , 1. mars 2011

Edmund Joensen
løgtingsmaður